Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 2. mars 2021
Mál nr.: 20/02788-2
Málsviðgjørt: jd

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.
(Heimild at skjóta grágás, treytir fyri at fáa loyvi til tess, ásetingar um kanningar og vísindaligar teljingar og lógartøkniligar og málsligar rættingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um fuglaveiðu**"

2. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:
"**(Fuglaveiðulógin)**"

3. Í § 1 verður "lóg" broytt til: "løgtingslóg".

4. Í § 4, stk. 1 verður "(§ 3)" broytt til: ", sbrt. § 3".

5. Í § 5 verður "grannastevnilógini" broytt til: "Lov for Færøerne om Grandestævne m.m.".

6. Í § 6 verður "smb. Ll. nr. 48 frá 9. juli 1970" broytt til: "sbrt. løgtingslóg um náttúrufriðing".

7. Í § 7, stk. 2 verður "smbr. lóg nr. 59 frá 1. apríl 1912" broytt til: ", sbr. Lov for Færøerne om Ophævelse og kundgørelse ved Kirkestævne m.m."

8. Í § 7, stk. 5 verður "kap." broytt til: "kapittul".

9. Í § 8 verður "lógini" broytt til: "løgtingslógini" og "v.m." verður broytt til: "o.a.".

10. Í § 15 verður "sunnu- og halgidøgum" broytt til: "sunnudøgum og halgidøgum".

11. Í § 17, stk. 1 verður "(smbr. §§ 14 og 16)" broytt til: ", sbr. §§ 14 og 16".

12. Aftan á § 17 verður sett:

"**17 a.** Uttan mun til ásetingarnar í § 17, stk. 1 og 2, kann tann, sum eigur, festir ella leigar lendi, søkja um loyvi at skjóta grágás á hesum lendi, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av henni.
Stk. 2. Loyvi eftir stk. 1 er treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur í loyvinum nærri treytir fyri at skjóta grágás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás, loyvd skotvápn og lóður, at tann, ið hevur loyvi, skal boða frá, hvussu nógv grágás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar uttan viðurlag, um biðið verður um tað. Loyvishavin skal hava loyvi uppi á sær, tá ið skotið verður.
Stk. 4. Tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás eftir stk. 1, kann loyva einum øðrum persóni at skjóta grágás á tí øki, sum loyvið fevnir um, treytað av, at viðkomandi hevur søkt um og fingið loyvi frá landsstýrismanninum.
Stk. 5. Loyvi eftir stk. 4 skal vera skrivligt, og loyvishavin skal hava hetta loyvið og loyvið eftir stk. 1 hjá sær, tá ið skotið verður. Loyvið skal vísast politinum, um biðið verður um tað.

§ 17 b. Landsstýrismaðurin stílar fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar."

13. Í § 18, stk. 1 verður "frammanfyri standandi grein" broytt til: "§ 17".

14. Í § 18, stk. 2 verður "Føroya landsstýri" broytt til: "landsstýrismanninum".

15. Í § 21 verður "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum" og "smbr. § 19" broytt til: ", sbr. § 19".

16. Í § 22, stk. 1 og 2 verður "lóg" broytt til: "løgtingslóg".

17. Í § 23, stk. 1 verður "sunnu- ella halgidegi" broytt til: "sunnudegi ella halgidegi".

18. § 24 verður orðað soleiðis:

"**§ 24.** Sektir, sum standast av misbroti eftir hesi løgtingslóg, fara í landskassan.
Stk. 2. Umframt sektina eftir stk. 1 skal tann seki endurrinda virðið á tí, hann hevur veitt, um hann ikki kann lata eigaranum veiðuna í feskum standi."

19. Í § 25, stk. 4 verður "lóg" broytt til: "løgtingslóg".

20. Í § 25, stk. 5 verður "Vaktar- og Bjargingartænastan" broytt til: "Vørn".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Ásetingarnar í § 17 a, sum ásett í § 1, nr. 12, fara úr gildi aftur 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Um løgtingsmál nr. 83/2013 og 91/2016

Við løgtingsmáli nr. 83/2013 varð skotið upp at loyva teimum, ið eiga ella leiga velt lendi, at skjóta grágás (*anser anser*), sum hevði sett seg á lendið. Grágásin var annars friðað sambært fuglaveiðulógini. Sum grundgeving fyri lógaruppskotinum varð víst á, at grágásin gjørdi seg inn á velt øki til skaða fyri grasvøksturin og elvdi til stóran miss fyri eigarar og leigarar.

Við løgtingsmáli nr. 91/2016 varð skotið upp at leingja heimildina at skjóta grágás til 2020. Í uppskotinum varð upplýst, at tær kanningar og vísindaligu teljingar, sum sambært uppskotinum frá 2013 skuldu gerast, ikki vóru gjørdar, men at landsstýrismaðurin fór at fara undir at leggja eina ætlan fyri at gera hesar kanningar og teljingar, so tær kundu brúkast sum grundarlag fyri fyrst eini stovnsmeting og síðani eini burðardyggari umsitingarætlan fyri grágásastovnin. Mett varð, at skuldi ein álítandi stovnsmeting gerast, skuldi hetta gerast fimm ár á rað. Mett varð samstundis, at henda kanning fór at kosta uml. 300.000 kr., og at kanningin átti at verið endurtikin t.d. fimta ella tíggjunda hvørt ár.

Heimildin at skjóta grágás fór úr gildi 31. mai 2020. Eftir hetta er víst á, at grágásin, eins og frammanundan, ger seg inn á grasvøkstur og avgrøði, t.d. epli og grønmeti, og at hetta hevur við sær fíggjarligan miss fyri tey, sum brúka lendi til landbúnað. Lógaruppskotið hevur til endamáls at minka um henda fíggjarliga miss við at loyva teimum, ið brúka lendi til landbúnað, møguleika at verja lendi og grøði við at skjóta grágás, annaðhvørt fyri at styggja ella drepa, meðan hon er á lendinum.

Lógarbroytingin loyvir, at skotið verður eftir grágás í ávísum førum, men grágásin skal framvegis kunna nørast í landinum, og tí er bara loyvt at skjóta, meðan grágásin situr á veltum lendi. Grágásin er sostatt framvegis friðað móti skjóting og veiðu á óveltum lendi. Afturat hesum er ikki loyvt at skjóta grágás, meðan hon bølir á eggum.

Búnaðarstovan hevur samlað inn talið av skotnum gæs árini 2014-2019: 47 gæs í 2014, 266 gæs í 2015, 217 gæs í 2016, 24 gæs í 2017, 36 gæs í 2018 og 39 gæs í 2019. Búnaðarstovan vísir tó á, at tað er ivasamt, um tølini eru umboðandi, tí fráboðanarskyldan tykist ikki virka til fulnar.

Grágásin er fevnd av Bonn-sáttmálanum *(Convention on Migratory Species of Wild Animals)*, sum m.a. ásetur, at villdýrasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, AEWA-avtaluni *(Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds)* og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi *(The Convention on Biological Diversity)*, sum Føroyar hava tikið undir við.

At loyva teimum, ið varða av lendi, ið er ávirkað av grágásini, at skjóta grágás, er ikki í sjálvum sær í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar og avtalur, men tað er treytað av, at hetta er burðardygt. Til tess at fáa greiðu á, um hetta er burðardygt, verður farið undir kanningar og vísindaligar teljingar. Slíkar kanningar og teljingar skulu gerast í fimm ár, um tær skulu kunna brúkast sum vísindaligt grundarlag undir eini avgerð um at skjóta grágás, og eiga síðani at verða endurtiknar t.d. fimta ella tíggjunda hvørt ár. Alt eftir teimum niðurstøðum, ið kanningar og teljingar geva, kann talan vera um bara at skjóta grágás fyri at verja lendið ella eisini vanliga veiðu eftir grágás.

Grágásastovnurin er ikki taldur, men Búnaðarstovan metir kortini, at loyvt kann verða at skjóta grágás, ið ger skaða á lendi og avgrøði.

1.2. Galdandi lóggáva
Víst verður til pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.
1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva, at grágás verður skotin í ávísan mun. Vinnuligur landbúnaður hevur stóran fíggjarligan miss av, at stórir flokkar av grágás eta avgrøðina, men eisini frítíðarlandbúnaðurin er fyri missi orsakað av grágásini.

Við lógaruppskotinum verða harumframt gjørdar lógartøkniligar og málsligar rættingar. Hesar rættingar hava ikki við sær innihaldsligar broytingar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur til endamáls at fáa til vega heimild at skjóta grágás.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til innanhýsis hoyring hjá Búnaðarstovuni og Umhvørvisstovuni. Búnaðarstovan tekur undir við uppskotinum við teimum grundgevingum, ið eru nevndar í uppskotinum. Umhvørvisstovan tekur ikki undir við uppskotinum og vísir á, at tað er ivasamt, um tað er rætt at loyva, at grágás verður skotin, so leingi stovnurin ikki er taldur.

Uppskotið hevur í tíðarskeiðinum 12.- 26. januar 2021 verið til ummælis hjá Bóndafelag Føroya, Føroya Fuglafrøðifelag, Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag, Havstovuni, MBM, Føroya Óðalsfelag, politinum og Tjóðsavninum. Sama tíðarskeið hevur lógaruppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur fingið viðmerkingar frá Bóndafelag Føroya, Føroya Fuglafrøðifelag, Føroya Óðalsfelag, Havstovuni, politinum og Tjóðsavninum:

Bóndafelag Føroya tekur undir við uppskotinum og mælir til, at *grágás* verður broytt til *villgás*, tí allar gæs gera skaða á bøin. Felagið mælir somuleiðis til, at loyvt verður at skjóta gás alt árið, og at avmarkingin um, at loyvt er ikki at skjóta gás, meðan hon bølir á eggum ella hevur ungar, verður strikað.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur ikki undir við at víðka uppskotið til eisini at fevna um aðrar gæs enn grágæs, t.d. brandgæs (*Branta leucopsis*) og øshvítar gæs (*Branta canadensis*). Í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2019 hevur verið loyvt at skjóta grágás undir ávísum umstøðum, tí grágásin hevur verið til serligan ampa fyri landbúnaðin. Onnur gásasløg eiga ikki at verða fevnd av uppskotinum, fyrr enn neyvari fuglateljingar eru gjørdar.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur til eftirtektar viðmerkingina um, at loyvt er at skjóta grágás alt árið, men hildið verður fast við, at grágás skal ikki órógvast ella skjótast, tá ið hon reiðrast. Viðmerkingin um, at gás skal kunna skjótast, meðan hon hevur ungar, er kortini tikin til eftirtektar.

Føroya Fuglafrøðifelag mælir frá at samtykkja uppskotið. Víst verður á, at vantandi vitan um stovnsstødd og -gongd ger, at eingin skjóting av grágás í løtuni kann roknast sum burðardygg, og at uppskotið tí ikki er í samsvari við sáttmálar og avtalur, sum Føroyar hava tikið undir við (sí pkt. 1.1. og pkt. 2.7.). Víst verður eisini á, at eingi skjalprógv eru fyri, at landbúnaðarvinnan hevur fíggjarligan miss av grágás.

Felagið skjýtur at enda upp at áseta hægsta mark fyri, hvussu nógv gás kann skjótast, at áseta greitt, nær ikki er loyvt at skjóta, og at loyvi at skjóta bara verður latið teimum, sum hava førleika at skjóta drepandi skot.

At enda verður mælt til greitt at áseta, at landsstýrismaðurin skal stíla fyri, at neyðugar teljingar og kanningar verða gjørdar.

Til hetta skal viðmerkjast, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tikið part av viðmerkingunum frá Føroya Fuglafrøðifelag til eftirtektar. Viðurskiftini, sum snúgva seg um stovnsmetingar o.a. verða tikin til viðgerðar, tá ið neyðugar teljingar og kanningar eru gjørdar.

Føroya Óðalsfelag hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

Havstovan vísir á, at tað er ov ógreitt at siga, at landbúnaðurin er fyri fíggjarligum missi av grágás, og at hetta átti at verið kannað. Víst verður eisini á, at treytir eiga at verða settar skotvápnum og lóðri, sum verða brúkt, so vissa fæst fyri, at fuglurin doyr beinanvegin, sbr. ásetingarnar í djóravælferðarlógini.

Havstovan vísir eisini á, at uppskotið ikki er í samsvari við sáttmálar og avtalur, sum Føroyar hava tikið undir við (sí pkt. 1.1. og pkt. 2.7.), tí burðardygg veiða er treytað av, at kanningar hava staðfest, hvussu veiðutrýstið skal vera.

Til hetta skal viðmerkjast, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tikið viðmerkingina frá Havstovuni um treytir fyri vápnum og lóðri til eftirtektar og broytt uppskotið samsvarandi.

Politiið mælir til at nágreina, at tann, sum skjýtur grágás, skal hava loyvið uppi á sær og skal vísa politinum hetta, um biðið verður um tað.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur broytt uppskotið samsvarandi viðmerkingunum frá politinum.

Tjóðsavnið vísir m.a. á, at grundgevingarnar fyri lógarbroytingini ikki eru nøktandi, og at uppáhaldið um fíggjarligan miss orsakað av grágásini ikki er skjalprógvað.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið skal til hetta viðmerkja, at viðurskiftini, sum snúgva seg um stovnsmetingar o.a. verða tikin til viðgerðar, tá ið neyðugar teljingar og kanningar eru gjørdar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí skipast skal fyri grágásateljingum. Mett verður, at kostnaðurin av hesum teljingum verður áleið kr. 300.000 í fimm ár.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Eins og áður skal Búnaðarstovan umsita loyvi at skjóta grágás. Mett verður, at hetta ikki krevur størri umsitingarliga orku.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Fyri landbúnaðarvinnuna hevur lógaruppskotið ta avleiðing, at landbúnaðarvinnan lógliga kann fyribyrgja, at grágásin etur grøði á veltum lendi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið verður mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið. Lendið kann vera fyri dálking, um patrónir og høgl ikki verða tikin upp. Vandi er eisini fyri, at grágásastovnurin kann minka, um ov nógv grágás verður dripin á hvørjum ári. Búnaðarstovan fylgir við, hvussu nógv grágás verður skotin, og neyðug stig verða tikin, um vandi er fyri stovninum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Grágásin er fevnd av Bonn-sáttmálanum *(Convention on Migratory Species of Wild Animals)*, sum m.a. ásetur, at villdýrasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, AEWA-avtaluni *(Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds)* og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi *(The Convention on Biological Diversity)*, sum Føroyar hava tikið undir við.

Føroya Fuglafrøðifelag og Havstovan vísa á, at uppskotið eftir teirra tykki ikki samsvarar við nevndu sáttmálar.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tað at skjóta grágás ikki í sjálvum sær er í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar, men tað er treytað av, at talan er um burðardygga veiðu. Mett verður eisini, at ein avmarkað skjóting kann verða loyvd, so avgrøði o.a. fær frið, meðan neyðugu teljingarnar og kanningarnar verða gjørdar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

Hoyvíkssáttmálin, sbr. løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum Stjórn Íslands, øðrumegin, og Stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri, hinumegin).

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir. Víst verður til revsireglurnar í §§ 22-25 í løgtingslógini.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur teimum, ið hava fingið loyvi at skjóta grágás, skyldu at boða frá, hvussu nógvar gæs eru skotnar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri treytir fyri at skjóta grágás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás, loyvd skotvápn og lóður og fráboðanarskyldu, eins og lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at skipa fyri kanningum og vísindaligum teljingum av grágásastovninum.

Lógaruppskotið heimilar harumframt politinum at krevja, at tann, sum skjýtur grágás, skal vísa politinum loyvið, um biðið verður um tað.

Aðrar heimildir eru ikki í lógaruppskotinum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1-2
Heitið á løgtingslógini verður broytt til *Løgtingslóg um fuglaveiðu*. Mett verður, at hetta heitið er nóg neyvt, og at tað tí ikki er orsøk at hava "v.m." í heitinum.

Samstundis verður ásett, at stytta heitið á løgtingslógini er *Fuglaveiðulógin*.

Til § 1, nr. 3-11
Talan er um lógartøkniligar og málsligar rættingar. Eingin innihaldslig broyting er gjørd.

Til § 1, nr. 12
Ásett verður í § 17 a, at tann, sum eigur, festir ella leigar lendið, kann søkja um loyvi at skjóta grágás, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av grágásini. Trupulleikarnir, ið sipað verður til, er skaði á avgrøði, bæði gras og annan vøkstur, t.d. epli og grønmeti.

Ásett verður, at landsstýrismaðurin gevur loyvi at skjóta grágás, og at landsstýrismaðurin leggur neyvar treytir við hesum loyvi. Ásett verður somuleiðis, at loyvi at skjóta grágás er treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um. Búnaðarstovan umsitur hesi loyvi.

Millum treytirnar, sum kunnu leggjast við loyvinum, er avmarking í tí tíðarskeiði, loyvt er at skjóta grágás. Tað er ikki siðvenja at skjóta fugl, meðan hann reiðrast, og tað eigur tí heldur ikki at verða loyvt, tá ið talan er um grágás. Avmarkingar kunnu eisini setast fyri skotvápn og lóður, ið loyvt er at brúka at skjóta grágás.

Loyvið kann eisini vera treytað av, at tann, sum hevur loyvi at skjóta grágás, skal boða frá, hvussu nógv grágás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar.

Ásett verður, at tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás, kann loyva *einum* øðrum persóni at skjóta grágás á tí øki, sum loyvið fevnir um. Hetta loyvið – frá tí, sum hevur fingið loyvi frá Búnaðarstovuni at skjóta grágás – er treytað av, at viðkomandi, sum fær loyvi, hevur søkt um og fingið loyvi frá Búnaðarstovuni. Hetta loyvið – at skjóta gás á ognini hjá øðrum – skal vera skrivligt, og loyvishavin skal hava bæði hetta loyvið og loyvið frá myndugleikanum hjá sær, tá ið skotið verður. Loyvið skal vísast politinum, um politiið biður um tað.

Ásetingarnar í vápnalógini eru annars galdandi í síni heild. Politiið hevur eftirlit við og handhevjar brot á vápnalógina og fuglaveiðulógina.

Lógarbroytingin hevur ongar serstakar revsireglur, og víst verður til revsireglurnar í §§ 22-25 í løgtingslógini.

Ásett verður í § 17 b, at landsstýrismaðurin skal stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar.

Til § 1, nr. 13-17
Talan er um lógartøkniligar og málsligar rættingar. Eingin innihaldslig broyting er gjørd.

Til § 1, nr. 18
Ásett verður, at sektir eftir hesi løgtingslóg fara í landskassan heldur enn ríkiskassan.

Til § 1, nr. 19-20
Talan er um lógartøkniligar og málsligar rættingar. Eingin innihaldslig broyting er gjørd.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samstundis verður ásett, at ásetingin í § 17 a fer úr gildi aftur 1. januar 2026.
Sólsetursásetingin fyri § 17 a er grundað á, at kanningar og vísindaligar teljingar skulu gerast komandi árini, so staðfestast kann, um grundarlag er fyri at skjóta grágás.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 2. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Bóndafelag Føroya
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Føroya Fuglafrøðifelag
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Føroya Óðalsfelag
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Havstovuni
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá politinum
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Tjóðsavninum